# Nýggj mynsturkapping

**Bindibúðin í SMS og Navia á Toftum skipa í næstum fyri eini mynsturkapping í binding. Talan er um alskyns pløgg, og freistin at lata inn er 1. juni**

BINDIKAPPING
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

At stokkarnir eru hægsti móti í hesum døgum, er eingin loyna. Og allar bindikappingar, sum í seinastuni hava verið útskrivaðar, hava eisini fingið sera góða undirtøku. Hetta hevur fingið leiðsluna í Bindibúðini í Havn og leiðsluna á Navia á Toftum at skipa fyri eini mynsturkapping, eins og tey gjørdu seinasta ár.

### Bindibók

Endamálið við kappingini er, eins og undarnfarna ár, at geva eina nýggja føroyska bindibók, við einum 20 ymiskum mynstrum, út. Fyriskipararnir vóna tí at fáa so nógv pløgg sum gjørligt, bundin úr Navia tógvi, inn, soleiðis at nógv verður at velja ímillum hjá dómsnevndini. Á tann hátt fær brúkarin eisini størstu ávirkanina á endaliga úrslitið, sum verður bindibókin.



*Mynstur til sjal, troyggjur, skóleistar, hosir, vøttir o.a. kunnu verða við í nýggju mynsturkappingini, sum Bindibúðin og Navia í felag hava útskrivað. 20 tey bestu mynstrini koma við í nýggju bindibókina, ið verður givin út í fleiri londum*

*Modelmynd: jens kr. Vang*

Uml. 20 ymisk mynstur verða, av eini dómsnevnd, vald út, at vera við í nýggju føroysku bindibókini. Ætlanin er at geva bókina út á føroyskum, donskum, norskum og íslendskum.

Umframt tey 20 útvaldu mynstrini, verður eisini ein vinnari funnin, sum fær ein kekk áljóðandi 5000 kr.

### Treytir

Fyrireikararnir siga seg vóna, at fáa troyggjur og pløgg bæði til børn, ung og vaksin.

Mynstrini skulu helst vera nýskapandi og fylgja tí móta, sum er frammi í løtuni. Samstundis hevði tó eisini verið gott, um mynstrini innihalda nakað av gomlu føroysku mynsturmentanini, soleiðis at bindibókin – hóast hon fylgir mótanum beint nú, eisini verður óavmarkað av tíðini og hevur røtur í tí gamlu mynsturmentanini. Fyrireikararnir siga seg eisini ynskja at fáa samlað sett av t.d. skóleistum, hosum, húgvum, handskum, vøttum og turrikløðum. Sjal eru eisini í hesum tíðum sera nógv nýtt, og sostatt er ynskiligt at fáa inn bæði stór og smá sjal, sum eru nýmótans og samstundis siðbundin føroysk.

Allir bindihættir kunnu verða nýttir til kappingina, og eisini kunnu pløggini verða bundin við maskinu. Tað er tó ein treyt, at pløggini eru virkað úr Navia tógvi. Um annað tógv er nýtt, verður mynstrið tikið úr kappingini.

Luttakararnir skulu eisini í stuttum greiða frá, hvussu plaggið er tilgjørt, og hvussu nógv tógv fer í plaggið.

Rættindini uppá mynstrini, ið koma inn til kappingina, verða latin Bindibúðini í SMS og Navia á Toftum.

### Freistin 1. juni

Innlatingarfreistin til mynsturkappingina er 1. juni 2005. Latast kann inn til Bindibúðina í SMS ella til Navia á Toftum.

Eins og undanfarna ár verður stórt tiltak á Torginum í SMS í samband við, at nýggja bindibókin kemur út. Her verður nógv ymiskt á skránni, sum t.d. framsýning av øllum pløggunum, sum koma inn til kappingina, og nógv annað spennandi.

Á Torginum verða eisini vinningar latnir teimum, sum koma við í bókina. Sjálvur vinnarin av kappingini verður tá eisini avdúkaður og fær ein kekk áljóðandi 5.000 kr.

Fyrireikararnir vóna, at undirtøkan fyri kappingini verður stór. Um fólk hava spurningar, eru tey vælkomin at venda sær til Bindibúðina ella Navia.

# G! í Gøtu

**– Vit høvdu samráðingar koyrandi við fleiri aðrar kommunur, og vit vildu fyrst hoyra hvat tær høvdu at bjóða. Men nú hava vit tikið av tilboðnum frá Gøtu kommunu, sigur høvðusmaðurin aftanfyri G!, Jón Tyril**

G!
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Tað er næstan vorðið líka so afturvendandi sum festivalurin sjálvur, at tað eru trupulleikar undir fyrireikingunum. Í fjør var tað ein spurningur um vantandi fígging, í ár hevur stóri spurningurin verið, hvørt festivalurin skuldi leggjast í Gøtu ella ikki.

– Trupulleikin botnaði í tí, at kommunan av fyrstan tíð setti nakrar avmarkingar, soleiðis, at vit ikki sluppu at skipa festival-økið á tann hátt, sum vit hildu vera best. Tí fóru vit í samráðingar við aðrar kommunur eisini, um møguliga at flyta G!-festivalin, greiðir Jón Tyril frá.

Hann sigur tó, at Gøtu kommuna 1. apríl samtykti, at fyrireikararnir av G! hóast alt skuldu fáa fríar teymar at skipa festivalin eftir egnum ynski. Hóast tað, valdu Jón Tyril og hinir fyrireikararnir ikki at taka av alt fyri eitt.

– Vit vóru jú farnir í samráðingar við aðrar kommunur tá, og tí vildu vit fyrst vita, júst hvat tær kundu bjóða okkum, sigur hann.

Spurdur um hinar kommunurnar, ið vóru upp á tal eisini eru í Eysturoynni, svarar Jón, at tað eru tær.

### G! fekk heimavøll

Men tá alt kom til stykkis, tóku fyrireikararnir av tilboðnum frá Gøtu kommunu hóast alt, og fríggjadagin 9. apríl varð avtalan undirskrivað.




*Hóast tað eina tíð sá nakað svart út, so verður G!-festivalurin hóast alt í Gøtu. 29. apríl verða nøvnini á bólkunum almannakunngjørd*

*savnsmynd*

– Vit hava nú fingið loyvi at skipa økið júst sum vit meta vera best, og vit ætla eisini at skipa tað betri enn í fjør. Eg fari ikki at greiða frá smálutum, men ætlanin er at fáa størri heild í økið, greiðir Jón Tyril frá.

Enn er bara eitt navn almannakunngjørt, hóast fleiri nøvn longu eru komin undir land, bæði føroysk og útlendsk.

– Vit hava boðað frá, at Makrel verður ein av bólkunum, ið fer at spæla. Hini nøvnini, sum longu eru fastløgd, verða kunngjørd 29. apríl, tá vit byrja at selja atgongumerki á torginum í SMS, sigur Jón Tyril at enda.

Sostatt kann staðfestast at ársins G!-festivalur verður í Gøtu í døgunum 22.-23. juli.

Fyrilestur í Føroyahúsinum:

# Medborgaraskapur og demokrati í Føroyum

**M.a. annað verður spildurnýtt tilfar lagt fram, um støðuna hjá borgarunum í føroyska samfelagnum**

FYRILESTUR

Fríggjakvøldið 15. apríl kl. 20.00 skipar MFS fyri fyrilestri í Føroyahúsinum í Keypmannahavn, har Hallbera West fer at leggja fram úrslit og niðurstøður úr høvuðsuppgávu síni í stjórnmálafrøði um medborgaraskap og demokrati í Føroyum.

### Framløgan

Framløgan fer at snúgva seg um, hvønn týdning støðan hjá borgarunum hevur fyri eitt nútímans demokratiskt samfelag. Í hesum sambandi verða úrslit og niðurstøður frá einari Gallup kanning í Føroyum løgd fram.

500 føroyingar vóru í juni 2004 við í hesi kanningini, har spurningar vóru settir viðvíkjandi fýra ymsum økjum: politiskum áhuga, demokratiskari luttøku, politiskum áliti og demokratiskum samleika.

Tað áhugaverda við kanningini er, at ein sonevnd medborgaraskapskanning ikki er gjørd áður í Føroyum. Í eitt nú Danmark, Noregi og Svøríki verða tílíkar kanningar gjørdar javnan. Úrslitini frá føroysku kanningini verða tí samanborin við úrslit frá líknandi kanningum í hesum trimum londunum.

Talan er sostatt um nýtt tilfar viðvíkjandi einum so týdningarmiklum evni, sum støðuni hjá borgaranum í føroyska samfelagnum.

**eys**